Skála-TB 5-1 (3-0):

# Favoritt-sigur á Skála

**TB fekk lítið gjørt, tá teir vitjaðu Skála, sum aftur í ár fekk fína kappingarbyrjan**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Skuldi nakar verið í iva, so var tað ikki av tilvild, at Skála í fjør brádliga fór at blanda seg í oddastríðið í bestu mansdeildini. Tað fingu tvørámenn greitt at vita, tá teir annan páskadag vitjaðu á Skála, nú teir aftur gera eina roynd at lívbjarga sær í føroyska fótbóltsoddinum.

### Mugu læra av mistøkunum

Og eftir dystin var liðskiparin hjá TB – og føroyska fótbóltslandsliðnum – Óli Johannesen, eisini passaliga erligur til at viðganga, at teir høvdu møtt einum nógv betri liði.

– Tað var einki serligt at fáa eina slíka byrjan, fyri at siga tað, akkurát sum tað er. Vit fáa ringastu hugsandi byrjanina, tá teir skora alt fyri eitt, og áðrenn vit hava mannað okkum uppaftur, er støðan longu 2-0.

– At tað so eisini júst var á Skála, har vit tvær tær seinastu ferðirnar hava fingið av at vita, mundi eisini seta nakrar tankar ígongd hjá fleiri av leikarunum, sigur Óli.

Til seinna hálvleik hevði TB tó fingið skipað seg nakað betri, og teimum eydnaðist eisini at minka um munin, men nærri enn tí sama komu teir so ongantíð.

– Vit royna kanska at flyta fólkið ov langt niðan, og so eru teir kvikir at revsa. Teir spæla óluksáliga góðan og skjótan fótbólt, og vit megnaðu als ikki at fylgja leikferðini, tá teir settu ferð á, so hatta var fult uppiborið. Kanska kundu vit fingið eitt sindur penari úrslit enn 5-1, men vit vóru so ikki nær námind nøkrum stigum, er turrisliga staðfestingin.

Men hóast avhølvingina, so vissar Óli um, at teir í TB á ongan hátt hava mist vónina, um at tað skal bera til at lyfta seg av botnsessinum.

– Nei, so langt ífrá. Enn eru jú 26 dystir eftir at spæla, og eg ivist ikki í, at vit koma aftur. Ikki minst rokni eg við, at nýggju leikararnir koma at lyfta liðið, og tá vit so eisini hava vant okkum við leikferðina, fer ivaleyst at síggja betri út.

– Og hóast alt, so kunnu vit ugga okkum við, at málini hjá teimum í flestu førum koma eftir mistøk. Tað eru lutir, sum vit so kunnu arbeiða við, so vit á tann hátt kunnu syrgja fyri, at tað í øllum førum ikki verður líka lætt at skora móti okkum í framtíðini, eru boðini av Tvøroyri.

### Sterkur hópur

Er lagið ikki í topp á Tvøroyri, so er skilið sum vera man øðrvísi á Skála eftir stórsigurin, sum altso sendi Skála í topp á stigatalvuni.

– Sum so høvdu vit eisini verið nøgdir, um dysturin endaði 1-0, men sum gongdin bleiv, so gjørdist tað heilt gott. Og eg haldi saktans, at vit kundu fingið okkurt málið afturat, staðfestir liðskiparin hjá Skála, Pauli G. Hansen.

Og hetta úrslitið vísir kanska eisini, at bronsukrónurnar í fjør á ongan hátt vóru úrslit av tilvild?

– Eg haldi sjálvur, at ein og hvør, sum sá okkum spæla í fjør, dugdi at síggja, at tað var ikki av tilvild. Vit hava eitt lið, sum megnar at spæla góðan fótbólt, og tað var tað, sum gav okkum heiðursmerkini. Men um tað verður eins gott í ár, kann eg so ikki siga í løtuni.

Seinnu helvt av kappingini í fjør tóktist tað, sum misti Skála luftina. Vandin fyri hesum er sjálvandi altíð til staðar, men sjálvur heldur Pauli, at teir í ár hava ein breiðari hóp.

– Pætur Dam Jacobsen og Bjarni Jørgensen spældu báðir 90 minuttir, og teir gjørdu tað heilt gott. Móti endanum fingu tríggir av okkara egnu ungu leikarum eisini nakrar minuttir, sum teir eisini komu væl frá. Og so hava vit eisini tríggjar útlendingar, sum enn ikki hava fingið spæliloyvi. So alt í alt haldi eg, at tað sær gott út við fólki, staðfestir Pauli G. Hansen at enda, áðrenn eyguni verða vend móti næstu uppgávuni.

Hon er á Mølini móti EB/Streymi, sum ofta hevur havt gott tak á Skála. Men júst á Mølini megnaði Skála í fjør at tryggja sær bronsuna, so talan er hóast alt eisini um góð minni.

## FAKTA UM DYSTIN

**Skála-TB 5-1 (3-0)**
1-0 Bogi Gregersen, 2.
2-0 Hanus Thorleifsson, 19.
3-0 Iulian Florescu, 37.
3-1 Emmanuel Larbi, 50.
4-1 Jónhard Frederiksberg, 71.
5-1 Jónhard Frederiksberg, 83.

**Skála:** Eugen Voda – Bárður Danielsen (Volmar Poulsen, 84.), Rúni Rasmussen, Pætur Dam Jacobsen, Iulian Florescu – Bjarni Jørgensen, Nenad Stankovic, Pauli G. Hansen, Hanus Thorleifsson – Bogi Gregersen (Johannus Mikkelsen, 84.), Jónhard Frederiksberg (Malmberg Olsen, 84.).

**TB:** Predrag Markovic – Byrgir Rasmussen (Emmanuel Larbi, 31.), Predrag Zivkovic, Óli Johannesen, Jón Johannesen – Allan Poulsen, Aleksandar Jovevic, Daniel Nyarko, Einar Petersen (Búi Mortensen 74.) – Hallur Christiansen (Petur Holm, 74.), Olivur Abrahamsen.

**GK:** Predrag Zivkovic.

**Dómari:** Páll Augustinussen.


## Verkfrøðingur til Fjarskiftiseftirlitið

Við tað, at eitt av starvsfólkunum á Fjarskiftiseftirlitinum fer frá vegna aldur, og at uppgávurnar á radiosamskiftisøkinum eru øktar, verður søkt eftir verkfrøðingi at røkja radiosamskiftis- og fjarskiftistøknifrøðiligar uppgávur, sum stovnurin umsitur.

Uppgávan hjá Fjarskiftiseftirlitinum er at umsita løgtingslóg nr. 79 frá 23. mai 1997 um fjarskifti. Lógin hevur m.a. til endamál at skapa fortreytir fyri frælsari kapping, skilagóða nýtslu av tilfeinginum, tøkniliga góðsku og tryggleika, ótálmaða atgongd til almenn fjarskiftiskervi, umframt samskipan av fjarskiftiskervi og at áhugamál brúkaranna verða havd í huga. Fjarskiftiseftirlitið umsitur innlendispartin av frekvensætlanini fyri Føroyar og hevur annars eftirlit við, at tey krøv, sum sett eru í nevndu lóg verða hildin og, at frekvenshavarar, kervis- og tænastuveitarar halda skyldur sínar. Harumframt er Fjarskiftiseftirlitið ráðgevi hjá landsstýrinum á fjarskiftisøkinum tá tað snýr seg um lógir og kunngerðir, liberalisering og fræls økir.

**Uppgávur hjá verkfrøðinginum**

Arbeiðið hjá verkfrøðinginum fevnir í høvuðsheitum um:

- at umsita og menna frekvensætlanina fyri Føroyar
- at menna tøknifrøðiliga førleika stovnsins á radiosamskiftis- og fjarskiftisøkinum
- at fylgja altjóða menningini, m.a. ITU Radio Regulations, CEPT- og aðra altjóða umsiting á radiosamskiftisøkinum herundir ERC/REC, ERC/DEC, ETSI ásetingar o.a.
- at menna førleika stovnsins á fjarskiftisøkinum
- at menna eftirlitsvirki stovnsins
- at gera kanningar um fjarskiftisviðurskifti
- at tilevna reglugerðir og mannagongdir
- at skriva frágreiðingar og vegleiðingar

Harumframt kunnu møguliga verða uppgávur at loysa fyri Posteftirlitið, tryggingareftirlitið og Kappingarráðið.

**Førleikakrøv**

Umsøkjarar skulu hava:

- Prógv sum verkfrøðingur, helst við radiosamskifti sum sergrein ella líknandi
- góð analytisk evni
- góðan kunnleika til føroyskt og enskt
- góðan kunnleika til IP- og teldutøkni

**Fjarskiftiseftirlitið kann bjóða**

Eitt sera fjøltáttað og sjálvstøðugt starv við avbjóðandi uppgávum, sum eru persónliga og yrkisliga mennandi, umframt møguleika fyri nógvum samskifti við altjóða fjarskiftismyndugleikar og aðrar myndugleikar í Føroyum.

Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar, umframt ráðstevnur innan fjarskifti.

**Setanartreytir og umsókn.**

Setanartreytir verða eftir galdandi sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag. Setanin umfatar Vinnumálastýrið og stovnar undir tí, umframt løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýrir.

Roknast má við, at starvið sum frálíður broytist í trá við menningina á fjarskiftisøkinum.

Umsóknir, saman við prógvum og møguligum ummælum, skulu sendast til:

**Fjarskiftiseftirlitið**
**Skálatrøð 20**
**Postboks 73**
**FO-110 Tórshavn**

og verða stovninum í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 18. apríl 2005 kl. 12.00.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Jógvan Thomsen, stjóra, tel 356020 ella 216020.

FJARSKIFTIS EFTIRLITIÐ
NATIONAL TELECOM AGENCY FAROE ISLANDS

*Fjarskiftiseftirlitið er stovnsett sambært løgtingslóg nr. 79 frá 23. mei 1997. Fjarskiftiseftirlitið hevur felags stjóra og skrivstovu saman við Kappingarráðnum, Posteftirlitinum og Tryggingareftirlitinum.*

TEAM85


Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
i